# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*Tann 8. februar 2006 fingu Evi Egholm og Hallur Gilstón Thorsteinsson, Frederiksberg, ein son. Hann vigaði 2900 gr. og var 49 cm.*



*16. februar fingu Paula Ólavsdóttir og Albin Johannessen í Klaksvík eina dóttur, hon var 53 cm lang og vigaði 4050 gram.*



*22. februar fingu Kristbjørg og Jóanes Brøðraberg, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3300 gr.j*

14. februar fingu Beinta Ejdesgaard og Magnus Dam, Keypmannahavn, ein son. hann var 51 cm. langur og vigaði 3320 gr.

17. februar fingu Gunnvá og Edvard í Miðvági, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

17. februar fingu Armgarð Eikhólm og Dan André Rasmussen, Hvalvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3450 gr.

17. februar fingu Maud og Arngrím Hansen, Syðrugøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3910 gr.

18. februar fingu Elin Jacobsen og Hjalmar Mortensen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

20. februar fingu Evi og Faber Isaksen, Søldarfjørður eina dóttur, ið eitur Eyð. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

21. februar fingu Anna-Elisabeth og Johnny Petersen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3435 gr.

21. februar fingu Annika Højgaard og Eyðun Matras, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3550 gr.

22. februar fingu Annika og Ingi Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3250 gr.

Hemarakappingin:

# Kristin Johansen á øðrum plássi



*Kristin Johansen við hemaranum, sum vigaði 150 kg og var 245 cm langur*

Kristin Johansen í Vestmanna fekk ein hemara við Kirkjubønes mikudagin 22. februar. Hann vigaði 150 kg og var 245 cm langur.

Við hesari vektini liggur hann á øðrum plássi í hemarakappingini, sum endar 1. mars 2006.

Teir høvdu roynt við hælin á Hesti í umleið ein tíma. Har var eydnan ikki við teimum, hóast tað er góð hemara leið. Síðan gekk leiðin móti kirkjubønesi. Tað bleiv kasta út við bø boðarnar. Og tá teir høvdu dyrgt í ein tíma var fast í einum hemara.

Tað gingu 2 tímar og 10 minuttir, áðrenn teir høvdu hemaran at borðinum og fingu lívið av honum.

Steinbjørn Hardlei, Argir:

# Starvsfólkaleiðari hjá Atlantic Airways



*Frá 1. mars er Steinbjørn Hardlei settur í starv sum starvsfólkaleiðari hjá Atlantic Airways*

Frá 1. mars er Steinbjørn Hardlei á Argum settur í starv sum starvsfólkaleiðari hjá Atlantic Airways.

Stóri vøksturin hjá felagnum seinastu árini hevur viðført at tørvur er á at seta eyka orku inn á at samskipa, savna og menna menniskjaligu orkuna í felagnum enn betri.

Uppgávan hjá starvsfólkaleiðaranum verður í tøttum samstarvi við stjórn og deildarleiðarar at tryggja at felagið og tess starvsfólk eru best møguliga útborin, inspireraði og motiveraði til at røkja felagsins áhugamál.

Starvsfólkaleiðarin virkar í eini stápsfunktión og vísir beinleiðis til stjórnina.

Steinbjørn Hardlei tók prógv í virkisbúskapi sum ba.oecon við Århus Universitet í 1994. Eftir hetta hevur hann royndir sum m.a. kredittráðgevi og starvsfólkaleiðari í Føroya Sparikassa.

Hann hevur harumframt tikið eina 1 ára altjóða serútbúgving í broytingarleiðslu á Professional Development Institute í Belgia í 2003.

Síðani hevur Steinbjørn Hardlei lisið kandidatlesnað í virkisbúskapi, cand.oecon., sum fjarlesandi við Århus Universitet. Samstundis hevur hann rikið ráðgevingarfyritøkuna Hugin spf., ið m.a. hevur fingist við at hjálpa føroyskum fyritøkum og stovnum á HR-økinum.

Steinbjørn Hardlei kemur úr einum starvi sum hr-mennari í Føroya Sparikassa.

# Grýludansur í VB húsinum

**Mánakvøldið verður stórur grýludansur í VB húsium, har Ein Blanding spælir og grýlur fáa virðisløn**

GRÝLUDANSUR

Føstulávintsmánakvøld verður stórur dansur í VB húsinum. Vágbingar halda fast við dans føstulávintsmánakvøld og hesaferð spælir Ein Blanding til dansin. Talan verður um bæði eldri og yngri tónar, eisini heilt nýggjar, ið eru frammi júst nú.

Vanligt er at møta grýluklæddur til dansin. Vakrasta, stuttligasta og ljótasta grýla skulu finnast.

## 101 ára føðingardagur

Mánadagin 27. februar fyllir Karl Jacob Sigvardsen við Gjógv 101 ár.

Karl Jacob er á ellisheiminum í Runavík.

## Gullbrúdleyp

Sunnudagin 26. februar hava Jónhild og Heini Gaard, Oyndarfjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kjallaranum hjá Eivind frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.